# Skúli fyri tíggjutals milliónir

**Felagsskúlin á Oyrarbakka verður útbygdur og umvældur fyri 30 milliónir. Arbeiðið skal vera liðugt um eini tvey ár**

SKÚLABYGGING
*Edvard Joensen*


*Felagsskúlin á Oyrarbakka, sum er frá 1974, skal umvælast og byggjast út fyri 30 milliónir krónur*

**Oyrarbakka:**
Felagsskúlin á Oyrarbakka skal umvælast og byggjast út fyri einar 30 milliónir krónur næstu tvey árini.

Felagsskúlin á Oyrarbakka gongur á 30. ári, og tí er eyðsæð, at umvælingar skulu gerast. Eisini ger nýggja skúlalógin tað neyðugt at gera útbyggingar fyri at nøkta tey krøv, sum í dag verða sett til skúlan, sigur formaðurin í stýrinum fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka, Sofus Debes Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu.

Skúlin skal umvælast fyri helvtina av teirri upphædd, sum ætlandi skal brúkast, sigur Sofus Debes Johannesen. Fimleikarhøllin og skiftirúmini skulu umvælast. Tær vanligu skúlastovurnar skulu víðkast frá teimum verandi umleið 50 fermetrunum til at gerast út móti 70 fermetrum hvør. Og skúlin skal í aðrar mátar tillagast skúlalógini, sigur stýrisformaðurin.

– Í grundini skal skúlin broytast, allur sum hann er, sigur Sofus Debes Johannesen.

Økið norðan fyri verandi høvuðsinngongd skal innilokast allan vegin norður til útbygningin, sum bygdur varð aftur at gamla skúlanum í 1980. Í somu linju, sum tann bygningurin.

Serhøli skulu byggjast, greiðir Sofus Debes Johannesen frá. Stovur til tónleik og media skulu gerast. Bókasavn og edv rúm skulu vera í einum. Nýggj matstova skal gerast, og umsitingin skal eisini flytast oman í nýggja tilbygningin.

Eisini skal gerast eitt felagshøli, sum ætlanin er skal líkjast nakað Klingruni í Norðurlandahúsinum ella soleiðis á leið, sigur stýrisformaðurin fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Sofus Debes Johannesen ásannar, at talan er um nógvar pengar. Og teir skulu so koma frá kommununum, sum eiga Felagsskúlan á Oyrarbakka. Tær eru tær kommunurnar, sum um hálvtannað ár í felag fara at eita Sunda Kommuna, saman við Eiðis Kommunu og Hósvíkar Kommunu.

Ein byginevnd er sett at hava eftirlit við byggingini. Í henni eru umboð fyri kommunurnar og lærararnar við Felagsskúlan.

Ætlandi skal farast undir forprojektering nú beinanveg, sigur Sofus Johannesen. Sjálv projekteringin og helst útbjóðing eisini verður so væntandi einaferð í heyst, og so skal sjálvt arbeiðið eftir ætlan byrja komandi vár. Arbeiði skal væntandi vera liðugt í 2005, sigur Sofus Debes Johannesen, formaður í stýrinum fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka.









# Norðurlendsk dansistevna í Vágum

**Í næstu viku verður norðurlendsk dansistevna hildin í Vágum. Tað er Vága Dansifelag, sum fær vitjan úr Danmark og Noreg, og tiltøk verða hildin ymsastaðni í hesum sambandi**

*Vága Dansifelag veðru í næstu viku vetur fyri norðurlendskari dansistevnu í Vágum. Millum annað fara danskir fólkadansarar at luttaka á stevnuni*



DANSISTEVNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
Vága Dansifelag verður vertur fyri norðurlendskari dansistevnu, suum verður hildin í døgunum annan til sjeynda juli.

Dansararnir fara at halda til í skúlanum á Giljanesi, og tiltøk verða so ymsastaðni. Mest verður gjørt burtur úr í Vágum, men farið verður eisini av oynni, og millum annað verður dansað í Havn fríggjadagin í næstu viku.

Vága Dansifelag er við í einum vinasamstarvi við dansifeløg úr hinum Norðurlondunum, og hava hesi feløg upp á skift havt dansstevnur, har vitjað hevur verið hjá hvørjum øðrum. Vanliga hava øll Norðurlondini uttan Ísland verið umboðað á hesum stevnum. Í ár barst tó bæði finnum og svium frá at luttaka. Kortini er gjørt av at halda stevnuna í Vágum í næstu viku. Eini 80 fólk fara at luttka á stevnuni, sum sjálvandi orsakað av avboðunum verður ein av teimum smærru. Vanliga plaga meira enn stórhundrað fólk at vera við til slíkar stevnur.

Stevnan verður sett á Giljanesi fyrrapartin hósdagin av Jørgeni Niclasen, løgtingsmanni fyri Vágar.

Seinnapartin verður dansað ymsastaðni í oynni. Og soleiðis heldur stevnan fram til inn í aðru viku, tá fremmandu gestirnir fara avstað aftur.

Útferðir verða gjørdar við gestunum. Fríggjadagin verður farið til Havnar, har dansað fer at verða í gongugøtuni og við SMS. Bæði útlendingar og føroyingar fara at dansa í Havn hendan dagin.

Sunnukvøldið verður almenn framførsla á Giljanesi, har bæði gestir og vertir fara at sýna fram ta skrá, sum tey hava vant til hesa stevnuna.

Fyrireikararnir siga, at fríggjakvøldið verður almennur dansur í Sørvági, sum Vága Dansifelag skipar fyri. Har verður bæði føroyskur og útlendskur dansur á skránni.

